Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri:

Klaksvík – ein ítróttardepil burturav

Umframt tað vinnuliga framfýsni er Klaksvík á serstakan hátt kend fram um aðrar fyri at vera ítróttarbýurin við tí sterka samanhaldinum, sum hevur fostrað mangar av Føroya fremstu umboðum á tí økinum.

– Hjartaliga vælkomin á Norðoyastevnu!

Nú stundar til Norðoyastevnu – ársins fyrsta FM-stevna í kappróðri og tann fyrsta stóra summarstevnan.

Við hesum er greitt, at ítróttarkappingarnar, sum hoyra summarhálvuni til, eru antin byrjaðar fyri stuttum ella eru um at byrja nú.

Tí er hóskandi við hetta høvið at nema eitt sindur við tann ítróttarliga partin av samfelag okkara, við støði í lokalsamfelagnum her.

Ítróttarúrmælingarnir, sum Klaksvík hevur fostrað, eru ikki fáir, og í fleiri ítróttargreinum hava lokalu feløgini ein glæsiliga søgu, sum ger tað til nakað serstakt hjá ungdóminum at verða við á teirra fremstu liðum, sum stoðugt eru í fremstu rað í heimligu kappingunum.

Eisini tá tað snýr seg um altjóða kappingar, hava feløg og einstaklingar hiðani verið slóðbrótandi fyri restina av landinum og eru tað framhaldandi.

Tað finnast fleiri dømi um vinnarar, sum eru komnir úr vánaligum umstøðum, men sum kortini við teirra vilja og evnum gjørdust úrmælingar.

Hóast hetta, so er eingin ivi um, at tað í dag hevur stóran týdning fyri trivnaðin og fyri menningina av ítróttinum at hava góðar umstøður.

Við at skapa góðar karmar kann kommunan, sum tann lokali myndugleikin, stuðla undir menningina av verandi virksemi umframt at skapa fortreytir fyri møguligum nýggjum greinum.

Allar avbjóðingar krevja sínar fyrireikingar, tað veri seg í ítrótti ella í øðrum høpi. Jú betur, tú ert fyrireikaður, tess betri eru útlitini fyri einum góðum úrsliti

Klaksvík stendur fyri eini veldigari avbjóðing og broytingartíð, nú Norðoyatunnilin verður veruleiki í 2006. Í hesum, eins og í ítróttini, er lívsneyðugt at vera vakin og gera tað, sum stendur í okkara makt at verða tilreiðar, so vit ikki vakna við kaldan dreym, tá tunnilin letur upp

Her, sum í øllum øðrum í okkara lokalsamfelag, er neyðugt at standa saman, skulu vit ikki missa meir fyri minni.

Á Norðoyastevnu er Klaksvík ein savningarmiðdepil, har eldri og yngri hitta hvønn annan, og fleiri, sum ikki hava hitst í mong ár, hava so mangt at skifta orð um.

Vit eru ómetaliga glað fyri at fáa vitjanir og vóna, at tit kenna tykkum væl okkara millum.

Hjartaliga vælkomin til Klaksvíkar, vælkomin á Norðoyastevnu 2003.

Steinbjørn O. Jacobsen
borgarstjóri

Norðoyastevnu blaðið 2003

Útgevari:
Sosialurin
Argjavegur 26
Postsmoga 76
FO-110 Tórshavn
Tlf: 341800 og 341820
Fax: 341801
Teldupostur:
post@sosialurin.fo

Blaðstjórn og lýsingar:
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein
ingrid@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
Jóannes Hansen
joannes@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen
runa@sosialurin.fo

Myndir:
Jens Kr. Vang
jensk@sosialurin.fo
Alvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo
foto@sosialurin.fo

Umbróting:
Hestprent

Forsíðumynd:
Børn úr Útibarnagarðinum Fjallafípan í Klaksvík.

Endurgeving av tilfari úr hesum blaði er bert loyvd, um greitt verður skilað til kelduna

Her er menning og nørandi gróður

Norðoyarstevnan boðar frá sumrinum. Alt nælir, fuglalívið er í hæddini og myrkrið hevur so at siga einki vald. Tað syrgir ljósið fyri. Fremmandu ferðafólkini vitja, og um fýra vikur fara tey, sum í hesum døgum sita og sveitta yvir bókunum, at síggjast við eyðkendu húgvunum og í lívsjáttandi lagnum, sum altíð hevur verið, er og vónandi fer at vera vørumerkið hjá ungdómimum, sum hava fingið prógv, og sum hava fleiri møguleikar, enn nakar annar nakrantíð hevur havt.

Klaksvíkin er barok. Sólkongarnir eru nógvir. Húsini kappast í stødd, dygd og útgerð. Høgur er livifóturin, vælabýur er. Soleiðis tekur Magnus Dam Jacobsen, sáli, til í bókini "Í Grønlandi við Kongshavn", sum hann gav út í 1976. Undir titlinum stendur í klombrum (heilsan frá einum proletari).

Í einum øðrum broti í somu bók sigur Magnus: Vinnulívsbygd er Klaksvíkin burturav. Tá samanum kemur, skuldi Klaksvíkin itið Havnin. Tí havn er allastaðni, hon veksur inn í bygdina. Ímyndi eg mær Klaksvíkina, síggi eg fyri mær fjøll, molar, pierar, havnaløg, trolarar, útróðrarbátar, fiskahús, pakkhús, truckar, lastvognar, handlar, verksmiðjur. Her yðjar og gresjar, livir og andar av verðsligheit og arbeiði.

Nógv vatn er runnið í ánna, síðani Magnus gjørdi sær hesa meting umborð á Kongshavn í Grønlandi. Men sannleikin í hesum er ikki minni nú, enn hann var, tá ið Magnus sat og grundaði umborð á Kongshavn í 1965, og tá ið hann gjørdi bókina lidna fyri einari stórari fjórðings øld síðani.

Ikki minst kreppan í níti árunum vísti, hvussu stór uppdriftin í fólkinum í Klaksvík er. Útróðrarmenn tóku seg saman og keyptu bátarnar aftur, sum vóru farnir av knóranum. Skiparar og fiskimenn fóru í samráðingar við figgingarstovnarnar og megnaðu at varðveita flotan og harvið arbeiðsplássini í býnum, og fakfeløgini fóru í samgongu við sparikassan og aðrar góðar kreftir, so tað bar til at endurreisa arbeiðsplássini í fiskivinnuni á landi. Hetta var gull vert fyri Klaksvíkina og Føroyar, og hetta tænti fólkinum, sum býr í Klaksvík, til miklan sóma.

Framburðurin seinastu tíggju árini hevur verið stórur í Føroyum og ikki minst í Klaksvík. Nú standa aftur stórar avbjóðingar fyri framman. Eisini í Klaksvík, sum kanska verður partur av meginlandinum, tá ið Norðoyastevnan fer at verða hildin um trý ella fýra ár.

Norðoyastevnuskráin boðar frá, at í breiðasta týdningini av hugtakinum mentan íður tað við lívi í Klaksvík.

Næsta vikuskifti verður gerandishamurin smoygdur av, og á áhugaverdum framsýningum og á gøtum og strætum – vónandi í góðum veðri – fara klaksvíkingar og norðoyingar at fegnast um summarið, samstundis sum teir ásanna orðini hjá Bernardi Brim, at í Norðoya prúðastu bygd er nørandi gróður. Klaksvíkingurin, sum er granni á Norðasta horni, kvøður í sínum sangi um heimbygdina soleiðis, sum ivaleyst mangir klaksvíkingar – burturi og heima í Klaksvík – kunnu taka undir við:

Ferðast ein víða ei kámast
í sinni
sóljuskrýtt Eiðið á
summarsins ong.
Borðoyarvíksbrimið fríkst
stendur í minni,
Kjølurin nørdi um
fuglanna song.
Klaksvíkar býur, komandi
tíðir
fylgi tær byrurin árini
mong.

Góða Norðoyastevnu og gott summar ynskja vit á Sosialinum við hesum serliga Norðoyastevnublaðnum.

Jan Müller, blaðstjóri